DAGSINS MEINING

Vantandi ví›skygni

Rithøvundurin Jens Pauli Heinesen hev›i t‡sdagin vi›merkingar og huglei›ingar um politisku stø›una í tjó›skaparspurninginum. Tey flestu, sum ikki eru sambandsfólk, kunnu helst taka undir vi› nógvum av tí, sum rithøvundurin skrivar. Somulei›is kunnu flestu føroyingar taka undir vi› teimum vælskriva›u brotunum, sum Jens Pauli tekur úr greinum hjá Jørgen-Frantz Jacobsen. Jørgen-Frantz var sjálvst‡risma›ur, men hann var ikki fanatiskur, og hann sá eisini nuansurnar, sum er ónatúrliga t‡dningarmiki›, um vi›komandi skal fáa umdømi at ver›a seriøsur ella ikki.

So er spurningurin, um rithøvundurin og samfelagsrevsarin hevur tær ney›ugu nuansurnar, sum skulu til fyri at l‡sa eitt mál seriøst og til fulnar ella ikki. Ta› kunnu lesararnir døma um. Á hesum sta› skal í øllum førum ver›a sagt, at rithøvundurin hevur neyvan fylgt nóg væl vi› í sjálvst‡ristilgongdini, tá hann koyrir Javna›arflokkin og Sambandsflokkin í sama leyp.

Ta› var Javna›arflokkurin, sum aftur setti fer› á or›askifti um føroyskt sjálvst‡ri og sjálvbjargni eftir landsfund floksins í 1997. Tá bo›a›i flokkurin frá, at hann fór av øllum alvi at virka fyri eini skrá, sum flokkurin kallar uppskot um eina sjálvst‡rislóg. Henda ætlan hevur til endamáls at taka av heimast‡rislógina og seta ein n‡ggjan sáttmála í sta›in. Eftir hesum sáttmála skulu føroyingar kunna yvirtaka írestandi málsøki, tá landsst‡ri og løgtingi› ynskja og samtykkja ta›. Eftir hesum leisti ver›a yvirtøkur framdar, tá orka og førleiki eru til ta›. Tá øll málsøki eru yvirtikin, og tá vit sjálvi megna at reka føroyska húsarhaldi›, ber til at taka avger›, um vit loysa og stovna føroyska l‡›veldi ella ikki.

Hetta er ikki sambandspolitikkur, men ein konstruktivur og hóvligur sjálvst‡rispolitikkur. Og gamalt er, at fram kemur hann, sum hóvliga fer. Fram koma vit ikki, um vit bara brúka skuldsetingar, um hvør er sambandsma›ur ella ikki, um vit eru nassireyvar ella ikki. Og so er líka miki› um hesi ókvæmisor›ini koma úr einum b‡i á Sælandi ella koma úr Føroyum. Hetta er líka so óseriøst, sum tá Edmund Joensen kallar Javna›arflokkin fyri loysingarflokk, samstundis sum Hergeir Nielsen ella Jens Pauli Heinesen kalla Javna›arflokkin fyri ein sambandsflokk.

Sagt ver›ur ofta, at vit eru eitt uppl‡st fólk. Men sjálvt í hesi tí› vi› øktum og betri tí›indaflutningi - í informatiónsøldini - mugu vit ásanna, at nógv skriving framvegis ber brá av vantandi tilvitan, ja vantandi tilvitan um fólkaræ›ilig rættindi. Sum t.d. tá rithøvundurin f‡list at teknara Sosialsins, Óla Petersen. Óli er satiriskur teknari. Og gjørdi hann ikki satiru burtur úr sitandi landsst‡ri, løgmanni, varaløgmanni ella landsst‡rismanninum í mentamálum hev›i hann ikki fingurin á pulsinum. So virka›i hann sum teknari í totaliterum stati.

Einki landsst‡ri er sloppi› undan. Vit minnast jú karikturin av Jógvani Sundstein, Atla Dam, Ivan Johannesen, Jógvan I. Olsen ella Maritu Petersen sum skúlafrøkun í løgmansstarvi. Jens Pauli Heinesen hevur skrivifrælsi og ein satiriskur teknari má eisini koma undir frælsi at siga sína hugsan í tekningum og linjum. Øll onnur hugsan er heimfø›islig. Men hann er ikki tann fyrsti. Bæ›i lærari og bókaútgevari og listaummælari hevur skuldsett teknaran fyri at renna sambandsørindi. Hetta vísir bara, at vit kunnu ikki lyfta okkum upp um ta› smáliga og heimfø›isliga lyndi›, sum vit eru fongd vi›, hóast allur skúlaskapur mi›jar ímóti størri tolsemi og ví›skygni.

NØVN Í VIKUNI

Hilmar Heinesen 90 år



Hilmar er født i Mi›vági i 1910. Så vi kan tænke os, at der er sket en kollosal forandring. Han har oplevet meget. Hilmar er døv. Dengang var forældrene fortvivlede, fordi de havde to ting at vælge imellem: Komme til Danmark på kostskole – eller bare gå der hjemme uden undervisning. Den første døveskole kom ikke før end i 1962.

Da Hilmar var 6 år rejste han hjemmefra med sin far. Hilmar kan ikke huske, hvordan det var at være døv, inden han rejste, men han kan huske, hvor flot det var på Skansen i Tórshavn, og han boede en nat i et stort hus i Tórshavn – det var K.F.U.K.

Efter 3 dages sejlads kom de til København.

Faderen rejste straks hjem igen og Hilmar kom til Fredericia. Problemet var, at når skolerne havde ferie, kunne Hilmar ikke komme hjem til sinde forældre, men boede skiftevis hos sine skolekammerats forældre, f.eks. plejebroder Adolf og plejebroder Thomas.

I 1924 i sommerferien oprandt dagen, da han skulle komme hjem. Skibet hed Slejpner. Da han kom kunne han slet ikke kende sine forældre. Han blev hjemme i en måned, så skulle han rejse igen. Denne gang kom faderen med en kusine, som hed Dagmar Joensen.

Jeg kunne fortsætte med mange vanskeligheder, som Hilmar har fortalt, men Hilmar er altid glad og velfornøjet.

Han flyttede senere til Færøerne for stor glæde for sig selv og for de unge døve.

Hilmar har altid været dygtig til sit arbejde som håndværker. Foruden sit håndværk, har Hilmar også en stor kærlighed til naturen; han har rejst meget også i alderdommen; han har været meget optaget af nordisk højskole for ældre mennesker, foresten har Hilmar den smukkeste håndskrift, jeg har set.

Til sidst vil jeg nævne en ting til – det er Hilmars interesse for at spinde garn. Det er meget godt strikkegarn, han producerer.

Kære Hilmar! Jeg var meget glad for at se dig ved julegudstjenesten for de døve, og det ved jeg, at alle var.

Jeg ønsker dig Herrens velsignelse og hjertelig tillykke med fødselsdagen den 7. december.

Jeg vil også ønske jer, Kristianna og Marius, tillykke. Tak for alt I har gjort for Hilmar. Han har nu boet hos jer i mange år – og I har trofast fulgt ham til mange forskellige arrangementer.

Endnu engang, Hilmar – tak for alt og hjertelig tillykke.

Tórshavn 02.12.00
Hanna Lisberg

Harry Williams farin

Sergeant Harry Williams RAP anda›ist í Norwich í Englandi fríggjadagin 1. december. Hann var 92 ára gamal.

Harry Williams var tann einasti av manningini upp á seks mans, sum yvirlivdi flogvanlukkuna á Nakkinum í november 1942. Hendingin er l‡st í sjónvarpssending, sum var› endursend fyri stuttum.

Harry Williams og konan Ella vitja›u á Tvøroyri, tá tey høvdu gullbrúdleyp í 1989. Eftir ta vitjanina søgdu tey, at hetta var besta vitjan teirra, og at tvørafólk vóru serstakliga blí›.

Hjúnini Williams hava seinnu árini bú› hjá eini dóttir í Norwich, har tey eisini í fjør hildu diamantbrúdleyp.

Harry Williams hevur veri› frískur og fer›ugur alla tí›ina hóast høga aldurin.

Um mi›an november var hann so óheppin at detta og bróta beini›. Hann var› lagdur undir skur›, men klára›i ikki hetta falli›, og anda›ist 1. december.

Harry Williams fer til gravar í Norwich leygardagin 9. december.

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Kæra um valsvik á Ei›i



Kæra er send bygdarrá›num á Ei›i um óreglusemi í sambandi vi› kommunuvali›

Mynd: Edvard Joensen

Bygdarrá›i› á Ei›i hevur fingi› eina kæru um bygdarrá›svali›. Bygdarrá›sforma›urin váttar, at kæran er komin, og hon ver›ur nú vi›gjørd

KOMMUNUVAL
Edvard Joensen

Ein borgari á Ei›i hevur kært til bygdarrá›i› um, at hann ikki er nøgdur vi› mannagongdina eftir bygdarrá›svali› 21. november. Kæran leggur upp til, at atkvø›ur eru fluttar, eftir at vali› var av.

Hans Jákup í Kollsbyrgi, bygdarrá›sforma›ur á Ei›i, váttar fyri Sosialinum, at ein kæra er komin til bygdarrá›i›, og at kæran nú ver›ur vi›gjørd eftir lógini.

Ta› vóru tveir listar til bygdarrá›svali› á Ei›i. Listi A fekk fimm limir valdar, og listi B fekk tveir. Men munurin millum sætta limin á lista A og annan á lista B var bara ein atkvø›a. Stø›an eftir vali› var tann, at var› ein atkvø›a hjá lista B til dømis dømd ógildug, skuldi vali› teirra millum avgerast vi› lutakasti, me›an sætti limurin á lista A var› valdur, um ein atkvø›a var› flutt frá lista B til lista A.

Ta› hevur ligi› á ljó›i, at samsvar ikki var millum taldu atkvø›urnar og valkortini í samband vi› bygdarrá›svali› á Ei›i. Søgur hava vilja› veri› vi›, at kært var um hetta.

Hans Jákup í Kollsbyrgi, bygdarrá›sforma›ur á Ei›i, váttar sum omanfyri nevnt, at bygdarrá›i› hevur fingi› eina kæru um vali›. Men vil ikki siga meira um máli› enn, at kæran ver›ur regluliga vi›gjørd.

Men Sosialurin hevur fingi› at vita, at talan er um rættiliga álvarsamar skuldsetingar móti valmyndugleikunum á Ei›i. Kært ver›ur millum anna› um, at onkrir atkvø›use›lar eru lagdir til viks undir uppteljingini, me›an a›rir eru komnir aftrat.

Tá bygdarrá›sforma›urin var› spurdur um hald var í hesum kærunum, svara›i hann bert, at um so var, var jú beinlei›is talan um valsvik.

Hans Jákup í Kollsbyrgi, bygdarrá›sforma›ur, sigur, at tá hann fekk kæruna, vendi hann sær til landsst‡ri› fyri at tryggja sær, hvussu farast skuldi fram í slíkum føri. Ikki eru reglurnar grei›ari enn so, sigur hann, at hann fekk ikki svar beinanveg. Men tá løgfrø›ingarnir í Tinganesi høvdu kanna› vallógina, fekk hann at vita, hvussu farast skuldi fram.

Men ta› var heldur løgi› í hesum fullveldistí›um, sigur Hans Jákup í Kollsbyrgi, at løgfrø›ingarnir noyddust at tulka danska lógartekstin fyri at finna út av, hvussu stø›an skuldi »tacklast«. Hetta tí, at danska umsetingin er grei›ari or›a› enn tann føroyski teksturin.

Forma›ur í tri›ings øld

Óli Jacobsen heldur fram sum forma›ur í Føroya Fiskimannafelag enn eitt valskei›

FORMANSVAL
Edvard Joensen

Óli Jacobsen er tann forma›ur í Fiskimannafelagnum, sum hevur siti› nógv longst

Mynd: Jens K. Vang

Tá Óli Jacobsen tekur vi› aftur einum n‡ggjum formansskei›i í Føroya Fiskimannafelag 1. februar komandi ár, hevur hann siti› í sessinum í 30 ár. Eftir komandi tr‡ ára skei›i› hevur hann sostatt siti› sum fiskimannaforma›ur í eina tri›ings øld.

Hetta tí›arskei›i› er ein tri›ingur av livialdrinum hjá Fiskimannafelagnum, sum ver›ur 100 ár komandi ár. Og ta› er samstundis nógv ta› longsta, ein einstakur forma›ur hevur siti›.

Óli Jacobsen er 57 ára gamal og ætta›ur úr Gøtu. Hann er giftur vi› Kirstin, f. Nielsen av Ei›i, og tey eiga f‡ra børn. Eina dóttir, sum er elst, og tríggjar synir.

Óli er nú fakfelagsforma›ur hjá elsta soninum, sum er vor›in fiskima›ur.

Formansvali› í Fiskimannafelagnum gongur yvir longri tí›, væl at merkja, um meira enn eitt valevni er. Hesafer› var einki anna› valevni› uppstilla›, tá freistin var úti 4. december, og tí var longu tá greitt, at Óli Jacobsen fór at halda fram sum forma›ur. Var› val, hev›i tí›arskei›i›, veljast kundi, veri› frá hálvum december til seinast í januar.

Á skristvouni hjá Føroya Fiskimannafelag starvast, umframt formannin, tvey skrivstovufólk í føstum starvi. Í løtuni er eitt tri›ja fyribilsstarv. Umframt er so bla›stjórin á FF Bla›num, sum heldur til á Bryggjubakka, men arbei›ir vi› bla›num burturav.

Óli Jacobsen hevur sum forma›ur í Føroya Fiskimannafelag eisini fingi› altjó›a álitisstørv litin til. Hann hevur í fleiri ár veri› forma›ur í fiskimannadeildini hjá altjó›a flutningsarbei›arafelagsskapinum, ITF. Í hesum sambandi› hevur hann einafer› veri› úti fyri at virka sum eitt slag av semingsmanni millum bretsk og argentisk áhugamál á einum fundi í Fraklandi eftir Falklandskríggi› fyrst í áttatiárunum.

Annars hevur Óli eisini luttiki› aktivt í føroyskum politikki. Hann var eina tí› tingma›ur fyri Javna›arflokkin, umframt at hann hevur veri› tingma›ur, og í tveimum skiftum landsst‡risma›ur, fyri Verkamannafylkingina.

Óli Jacobsen hevur ikki naka› fast frítí›arítriv sum so. Hann gongur eitt sindur í kvøldskúla solei›is av og á. Hevur millum anna› lært seg eitt sindur av russiskum. Frítí›ina roynir hann at brúka saman vi› familjuni.

Teir tóku land 5

- føroyingar í Grønlandi

Jógvan Arge hevur givið út eina nýggja bók í røðini "Teir tóku land". Greitt verður frá, tá føroyingar í túsundatali stevndu til Grønlands í 1959. Samstundis legði landsstýrið doyðin á at fáa nýggj rættindi. Tað eydnaðist, men føroyingar noyddust at avreiða til KGH fyri undirprís afturfyri.

Nýggjar útróðrarstøðir vórðu bygdar í Borgshavn, Kangarssuk og norðaru havn í Ravnsoynni, og Nordafar grundaði sítt flakavirki í Føroyingahavnini. Trolarar fóru við bátum til Eysturgrønlands, og stórreiðarin Jógvan Kjølbro í Klaksvík sendi eina heila konvoy av deksbátum hagar við flaggskipinum "Karin K" á odda.

Føroyski skipaflotin undir Grønlandi var størri enn nakrantíð. Millum Nuuk, Tórshavn og Keypmannahavn var álvarsom diplomatiskt ósemja um Eysturgrønland. Politikararnir og fólk vóru á gosi.



Jógvan Arge